## inni - trygt og ómaksleyst til hús



### Tvíhús - Áargeil 13B, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum. Grundøkið er 283 fermetrar. Byggiár: 1986. Í niðastu hædd, sum er 39 fermetrar er durur, baðirúm, køkur, stova, kamar umframt vaskirúm, kjallararúm og fýrrúm á 15 fermetrum. Í miðhæddini, sum er 44 fermetrar, er køkur, stova, kamar og baðirú umframt stór inngongd. Í ovastu hædd, sum er 48 fermetrar, er køkur, stova, kamar og baðirúm. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



### Tvíhús - Skørugøta 5, Tórshavn

Húsini eru í 2 hæddum, hvør 67 fermetrar, í alt 134 fermetrar - alt innrættað. Grundøkið er 348 fermetrar. Byggiár: 1982. Í ovaru hædd er køkur, stova, hjúnarrúm, wc, altan og gongd. Gott pláss er á ovasta lofti, sum kann innrættast. Í niðaru hædd er durur, stór gongd, bryggers, 2 stór kømur og stórt baðirúm við klæðnarúmi. Nýtt stórt bilhús á uml. 30 fermetrar er framman fyri húsini. Húsini standa við blindan veg í friðarligum, barnavinarligum umhvørvi og hava sera gott útsýni. Prísuppskot: kr. 1.800.000,00.



### Sethús - Hvalvíksvegur 69, Hvalvík

Húsini, sum upprunaliga eru bygd í 1920'unum og høvuðsumvæld 2001-2005, eru í 3 hæddum. Alt er grivið upp og steinsett av nýggjum, og allar innleggingar eru nýggjar. Niðasta hædd og miðhædd umleið eru 45 fermetrar og ovasta hædd er umleið 30 fermetrar - í alt um 120 fermetrar búøki. Grundøkið er 270 fermetrar. Á loftinum eru 2 kømur, baðirúm og alrúm. Í miðhæddini er inngongd, durur við hita í gólvinum, gongd, køkur, kovi og 2 stovur. Í niðastu hædd er nýtt baðirúm við gosbað og kjallararúm. Omanfyri húsini er hjallur á 8 fermetrar og fjós á 15 fermetrar. Húsini standa væl fyri mitt í bygdini nær við skúla og barnagarð. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

### Jørð - Johansgøta / Mylnugøta, Signabøur

Ognin eru tvey stór jarðarstykki á Signabø. Annað stykki, ið er uml. 7.500 fermetrar, liggur í A1 bústaðarøki, og hitt, ið er uml. 3.000 fermetrar, er eitt friðað landbúnaðarøki - í alt uml. 10.500 fermetrar. Jørðin verður seld í einum. Ognin liggur í náttúruvøkrum og friðarligum umhvørvi omanfyri nýggja kaiøkið á Signabø og verður seld, um hóskandi boð fæst.



### Summarhús – Reyða túgva, Kvívík

Summarhúsið er annað av arkitektteknaðu húsunum ella smáttunum, ið vanliga verða kallað "Túgvurnar", sum standa í haganum omanfyri Kvívík. Húsið er bygt úr timbur á stoypta grund og við flagtaki. Tað er 28 fermetrar við lofti ella hemsi. Í neðra er inngongd, durur, baðirúm, køkur / stova / sovirúm í einum. Í erva er hemsur við soviplássi. Vegur er til húsini, sum standa á leigaðari grund (7.500 kr. um árið) í sera vøkrum, friðarligum og barnavinarligum umhvørvi. Fleiri upplýsingar fáast á www.tugvurnar.fo og hjá INNI. Prísuppskot: kr. 275.000,00



### Eigaraíbúð – Niðaragøta 4 – 14, Hoyvík

Ognin er ein eigaraíbúð á 48 fermetrar í einari hædd. Í íbúðini er gongd, 2 kømur, baðirúm, køkur, stova og vaski - / goymslurúm. Íbúðin, sum hevur felags antennuskipan, liggur í friðarligum og barnavinarligum umhvørvi og hevur gott útsýni yvir Nólsoyarfjørð. Byggiár 2002. Íbúðin verður seld um hóskandi boð fæst.



### Hotel Norð - Viðareiði

Nú er stáðsiliga hotellið á Viðareiði til sølu. Bygningurin er í 2 hæddum – í alt 1100 fermetrar. Grundøkið er heilar 10.000 fermetrar. Byggiár 1975 / 1990. Í niðaru hædd er inngongd, stórt móttøkuhøli, mannfólka- og konufólkawc, fundarhøli til 30 fólk, barr, skrivstova, matstova til 190+90 fólk, líti veitsluhøli / uppihaldsstova til 25 fólk, køkur, grovkøkur, starvsfólkawc, goymslurúm og hjallur. Í ovaru hædd er stór trappuuppgongd, 15 dupultkømur við baðirúmi, minibar og sjónvarpi og lítil privatur køkur og vaskirúm. Hotellið stendur í avbera náttúruvøkrum og friðarligum umhvørvi og hevur sera gott útsýni. Fleiri upplýsingar fáast á www.hotelnord.fo og hjá INNI. Hotellið verður selt, um hóskandi boð fæst.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Wolford







SIRI VÆLVERA
DR. JACOBSENSGØTA 18
FO 100 TÓRSHAVN
TEL 31 66 10

Wolford







SIRI VÆLVERA
DR. JACOBSENSGØTA 18
FO 100 TÓRSHAVN
TEL 31 66 10









Tín stóri dagur

Takka í Sosialinum